## Berlusconi-sakførari dømdur

Ein dómstólur í Italia dømdi í gjár bretska sakføraran David Mills sekan í at hava tikið ímóti umleið fimm milliónum krónum í mutri, og fyri tað skal hann sita hálvt fimta ár í fongsli. Í rættinum helt ákæruvaldið uppá, at sakførarin hevði fingið muturpengarnar frá italska forsætisráðharranum, Silvio Berlusconi, men hesum hevur forsætisráðharrin víst aftur. Ákæruvaldið ætlaði eisini at stevna Berlusconi fyri rættin, men tað eydnmaðist honum at fáa tjóðartingið at broyta lógina, so forsætisráðharrin kann ikki dragast í rættin.



## Fleiri hermenn til Afghanistan

Barrack Obama, forseti, hevur givið herleiðsluni boð um at senda 17.000 amerikanskar hermenn afturat til Afghanistan. Teir flestu hermenninir skulu til tann ófriðarliga Helmand-landspartin har suðuri í Afghanistan, har teir donsku hermenninir eisini eru. Boðini frá forsetanum eru, at teir 17.000 hermenninir skulu til Afghanistan sum skjótast. Generalurin David McKiernan, sum er ovasti fyri teimum amerikonsku herdeildunum í Afghanistan, hevur biðið um at fáa 30.000 hermenn afturat. Tað sigur hann vera neyðugt fyri at berja al-Qaeda og Taliban niður.



# Frálíkt tónleika vikuskifti hjá Suðuroyar og Vága musikkskúla

**Eini 80 næmingar úr Suðuroyðar og Vága musikkskúla savnaðust til tónleikaligt vikuskifti í felagsskúlanum á Giljanesi seinasta vikuskifti**

*Skrivað hevur: Jens Mortan Mortensen*
*Myndir: Mikkjal Bærendsen*

Tað var ein frøi at síggja børn og ung sita og blása á sítt ljóðføri – tey yngru í einum bólki og tey eldru í øðrum bólki.

Frá byrjan til enda varð vant og øll orka løgd í tónleikaligt virksemið.Varrar vórðu eymar og steðgirnir við spæli og onkrum filmi komu væl við.

Vinarlagið var næstan beinanvegin millum børnini, sum funnu saman í teimum ymisku floksstovunum, har tey reiddu sær ból og hugnaðu sær.

Maturin var góður og alt var sera væl fyrireikað. Pizza á matarseðlinum leygarkvøldið – og 'Mamma Mia' omaná. Alt var gott innanveggja, hóast váta veðrið uttanfyri – men tað bilti ikki, tí inni var pláss at spæla.

Eg haldi, at hetta er tónleikur, tá hann er bestur: Ein mennandi virkin tilgongd við næmingum, sum alla tíðina vóru í menning. Tey dugdu betur og betur og á konsertini sunnudag hoyrist úrslitið, har tey stólt vístu foreldrum, ommum og abbum, hvat tey nú megnaðu at spæla.

Meti, at tað gevur næmingunum eina kenslu av sjálváliti, hetta at megna og vera vís í at hoyra nær tónleikurin ljóðar væl og nær nakrar av stemmunum ikki liggja rætt. At duga betur eftir nógva venjing setir krøv til bæði næmingar og lærarar – og tað er tann vegin vit skulu fara. Vit mennast, tá ið viljin til at gera okkara besta er har.

Og hetta vikuskiftið – vóru musikkskúla næmingarnir í suðri og har vesturi frá, veruliga í teimum røttu karmunum, har viljin at læra – natúrliga var til staðar.

Eitt slíkt vikuskifti krevur, at leiðarar, lærarar og foreldur samarbeiða um virksemi barnsins. Eini 10 foreldur úr Suðuroynni komu við sum náttarvaktir, og foreldur har vesturi stóðu fyri matgerðini. Uttan áhuga frá forledrum kann eitt slíkt tiltak als ikki haldast.

Tí kennist tað gott, tá ið tónleikastevnan endaði við frálíkari konsert, har næmingar vóru mentir, tónleikalærarar nøgdir og foreldur fegin um, at alt hevði gingið so væl!

Fyri meg sum kom úr Suðuroynni, sum foreldur, virkaði tað sum um at alt var professionelt fyrireikað. Eitt gott dømi um samarbeiði millum leiðara, lærarar og foreldur, har øll hava felagsmálið: At einstaki næmingurin skal menna seg tónleikaliga í einum tryggum og innihaldsríkum felagsskapi.

Takk fyri eitt gott og væl tilrættarlagt tónleikavikuskifti.